VIÐMERKINGAR

## Konsert í Norðurlandahúsinum

**Føroya Jazztónleikarafelag og Norðurlandahúsið skipa fyri konsert í Norðurlandahúsinum í morgin**

*Tíðindaskriv*

Sunnudagin 25 januar kl 16.00 skipar Føroya Jazztónleikarafelag og Norðurlandahúsið fyri konsert í Norðurlandahúsunum.

Konsertin er tann triðja í røðini av fýra, sum serliga er ætlað ungum føroyskum musiktalentum, sum hava áhuga í jazztónleiki.

Tey, ið luttaka í fyrru helvt á hesi konsert eru Jens Dam Ziska á trumpet, Nicolina Djurhuus á trombon og Kári Mouritsen á Kontrabass.

Tey hava øll trý verði sera virkin, og hava tey tað til felags, at øll spæla við í Big Bandinum "Jazzarnir", sum Brandur Øssurson stjórnar.

Teir, ið spæla undir hjá hesum trimum ert Stamen Stanchev á klaver, Eyðun Egilstrøð og Magnus Madsen á slagverk.

Seinnu helvt av konsertini eigur Gunnar Guttesen, sum ta síðstu tíðina javnan hevur verið at hoyrt á tí føroyska tónleikapallinum.

Eisini kenna vit hann í samband við gospelkórið United Voices, har hann er fastur klaverspælari.Vð sær til hesa konsertina hevur hann fingið tríggjar góðar og royndar tónleikarar. Við trummurnar kemur Brandur Jacobsen at sita, og hann kenna vit fyrst og fremst frá bólkinum "Ivory", á gittar spælir Mikkjal Hvannstein, sum flestu munnu kenna frá bolkinum "I am" og við bassin kemur Bárður Háberg at spæla, og hann er m. a. við á tveimum nýútkomnum fløgum, bæði tí hjá Torkil Mørkøre og tí hjá Unn Paturson. Teir koma millum annað at spæla løg frá Mezzoforte og Dave Wecl.

Konsertin verður umleið ein tíma til longdar (uttan steðg) og kaffeterian verður eisini opin.

Føroya Jazztónleikarafelag og Norðurlandahúsið.

# Gekkaskortatíð: Komið og spælið fullveldi við einum hálvum sannleika!

**Regin Eikhólm**

Ein hálvur sannleiki er ein heil lygn, sigur jødiskt orðatak. Hetta fær meg at hugsa um fullveldisframferðina hjá landsstýrismanninum í fullveldismálum, Høgna Hoydal. Hann legði hart út við at brúka 10 tals milliónir krónur av skattagjaldarans peningi til at útgeva Hvítubók og ein fagurlittan propagandafaldara. Hesar báðar útgávur hava tað til felags, at tær einans tala søk fullveldisins. Hetta er eitt einoygt propagandatiltak, sum við hálvum sannleika hálovar loysingini uttan at hava nakað alternativ at samanbera við.

Okkara kendi og í fjølmiðlunum ofta endurgivni samfelagsfrøðingur, Jógvan Mørkøre, segði í eini samrøðu við Sosialin, at um rætt varð farið fram, átti andstøðan at fingið eins nógvan pening og Hvítabók kostaði, til at gjørt sínar egnu metingar um framtíð Føroya. Tá høvdu Føroya fólk havt eitt reelt val, men sum øllum kunnugt fekk andstøðan ikki eitt klovið oyra.

Tvørturímóti so sendi loysingarministarin sínar talsmenn land og ríki runt við Hvítubók undir arminum umboðandi hálvan sannleika um ljósareyðu framtíðar møguleikarnar fyri fullveldið Føroyar. Ikki eitt orð um eina alternativa sjálvstýrisloysn innan fyri verandi ríkisfelagsskap. Hvussu kann mann hálova náttini uttan at kenna dagin?

Løgmaður gjørdi tað ikki lættari fyri Føroya fólk, tá hann ikki tordi at halda sítt lyfti um breiða undirtøku, áðrenn farið varð til Danmarkar at samráðast. Helst hevur fullveldismaskan frá varaløgmanni blindað ov nógv?



### Maskurada

Samráðingarúrslitið talar annars fyri seg. Fullveldisætlanin fánaði burtur, tá hon møtti veruleikanum, eins og tá maskurnar falla í eini maskuradu. Fáur man í dag taka fullveldisætlanina í fullum álvara, sum tá alt kemur til alt, bert umboðar hálvan sannleika og/ella eina heila lygn, sambært ísraelska orðatakinum.

Ongastaðni í Norðurlondum hevði borið til at framt slíka alment fíggjaða fullveldis propagandu, sum tað vit eru vitni til í Føroyum. Ímóti allari sunnari fornuft er nú eisini ætlanin at halda eina tóma fólkaatkvøðu fyri at káva út yvir ella at bera í bøtuflaka fyri politiska samráðingarmistakið og ómegd!

Onki ítøkuligt er at taka støðu til, sjálvt ikki ein fullveldisfíggjarætlan hevur verið at sæð. Tá vóru Øskudølgur og Sópingarkona frægari, tí tey royndu seg tó við ítøkuligum argumentum!

Tá Høgni Hoydal í Dimmalætting (23/1-01) sigur, at gekkaskortanir mugu falla, so veit hann helst, hvat hann tosar um, tí undir ”samráðingar-maskuraduni”, fullu fleiri fullveldisgekkaskortar, men tað, sum kom til sjóndar, var til lítlan sóma fyri Føroya fólk.

Andstøðan og Nyrup hava alla tíðina sagt og hildið fast við, at ein stórur meiriluti av Føroya fólki skal standa aftanfyri eina komandi nýskipan. Hetta er í tráð við fólkastýrið og enntá við íslendsku loysnina. Tí er ikki neyðugt hjá andstøðuni ella Nyrup at bera masku ella gekkaskort, og tøkk fáið tey fyri tað!

Hetta er tíverri meir enn vit kunnu siga um landsstýrismannin í fullveldismálum, men kanska onkur gekkaskortur fellur av afturat, áðrenn vit verða send apríl!

Høgnalogikkur: Tá vit eru samd um alt, hví eru vit so ósamd?

# Danir virða føroyskt ynski um fullveldi!

**Jákup Fróði Djurhuus**



- Men Landstýri vil hava donsku stjórnina at bróta grundlógina.

Danska stjórnin hevur gjørt púra greitt, at føringar fáa fullveldi, um vit ynskja tað. Danska stjórnin hevur bjóða Landsstýrinum 4 ára skiftistíð, og somu rættindi sum hini norðanlondini hava, um Føroyar gerast fullveldi.

Men trupulleikin er, at Landsstýri ikki torir at taka av tilboðnum.

Tá danski forsætismálaráðharrin sigur við útvarpi á middegi týsdagin, at hann ikki kann binda seg til frammanundan í eini yvirlýsing at góðtaka eitt møguligt úrslit av eini fólkaatkvøðu, so heldur hann seg bara til ásetingarnar í grundlógini.

Tað skal nevniliga samtykkjast av fólkatinginum, tá avgerðin fyriliggur.

Vanligi føringurin kann bert verða fegin um, at danska stjórnin eisini í hesum máli virðir grundlógina, nú tjóðveldismenninir í “kongagøtu” mæla til at bróta hana.

Um henda hugsanin, at kunna bróta grundlógina tá best ber til, verður tann berandi í einari føroyskari grundlóg, so er ikki nógv gott í væntu.

Hví er tað nú so umráðandi hjá Landstýrinum at fáa eina bindandi undirskrift frá donsku stjórnini frammanundan, tá ið teir væl vita, at danska stjórnin virðir ynski føringa um fullveldi?

Er hetta ikki enn ein roynd at skapa samanbrestir við donsku stjórnina áðrenn fólkaatkvøðuna?

### Grenja ófført

Hóast Landstýri grenjar ófført, og er sera ónøgt við at vera í ríkisfelagsskapi við Danmark, so hava teir enn ikki kunna víst á eitt einasta ítøkiliga dømi um, hvat verður øðrvísi og betri, fáa teir sín vilja.

So Landstýri skyldar føroyingum eitt greitt svar uppá, hvat í teir ætla við einari fólkaatkvøðu, heldur enn at spæla myrkaspæl, og krógva framtíðina fyri føringum.

# Føroyavinurin Björn Hagström verður 80 ár

Føroyingar eru so víðfarnir, at tú kanst renna teg í teir allastaðni. Eisini kanst tú hitta fjarstaddar útlendingar, ið bæði skilja og duga føroyskt. Tílíkur »føroyingur« er Björn Hagström! Hann er føddur og aldur upp í Svøríki, men varð tíðliga fongdur við hesi sjúkuni, sum bara útlendingar fáa: tí føroysku, at leggja sín hug á tað føroyska! Chr. Matras mundi vera »smittuberin«. Bjørn las norrønt og føroyskt í Keypmannahavn. Christian var honum góður ráðgevi, og Bjørn sat mangan væl hjá teimum Marionnu á Vesturbúrgv og uppi undir Varða.

Vakti áhugin í hesum ídna svenska føroyinginum fekk hann at leita til Føroya at lurta. Vit hittust í Havn fyri einum hálvthundrað árum síðani og hava hildið sambandið við hvønn annan síðani. Burtur úr Føroyaferðunum, tá ið Björn vitjaði við bandupptakara, kom m.a. doktararitgerðin Ändelsevokalerna í färöiskan (1967), sum er eitt merkisvert verk í føroyskari málfrøði og tað fyrsta av hesum slagi. Fyri 10 árum síðani gav Emil Thomsen út »Átta greinir um føroyskt mál« eftir Bjørn, sum eg kann mæla øllum at lesa.

Sum ikki-føroyingur dugir Bjørn betur enn vit at hoyra og taka fram dømi úr talaða málinum, sum vit ikki gáa so væl eftir, tí vit eru so bókstavabundin av skriftmálinum og lata tað í ov stóran mun sleppa at ávirka og avgera framburðin.

Eftir í nøkur ár at hava undirvíst m.a. í føroyskum við lærdar háskúlar í Svøríki kom hann til Føroya at undirvísa á Fróðskaparsetrinum sum gestaprofessari, til hann í 1978 varð settur sum vísindaligur høvuðsritstjóri á stóru orðabókini Ordbog over det norrøne prosasprog við universitetið í Keypmannahavn. Hann gavst har í 1986, varð professari í føroyskum á Fróðskaparsetrinum, men mátti leggja frá sær í ótíð av serligum grundum.

Bjørn er giftur Bothild úr Noregi. Hon er útlærd arkitektur og segði mær einaferð, hvussu hon helt, at vit áttu at varðveitt Múrin í Kirkjubø. Mær kunnugt hevur hon ongantíð alment greitt frá hesum áhugaverda uppskoti, so eg fari ikki at avdúka tað og kanska elva til meira óneyðugt kjak um tann spurningin.

Bothild og Bjørn eiga døturnar Tullu og tríburðarnar Kerstin og Gunvor. Tulla er lækni, sum blaðung skrivaði hon tvær væl dámdar barnabøkur um upplivingar við rossum úti á bygd norðuri í landinum. Kerstin er arkitektur sum mamman. Gunvor er tónleikari, hevur spælt í operaorkestrum. Bothild og Bjørn eru aktivir pensjónistar m.a. syngja tey í kóri.

Vit bæði Anna yunskja góða eydnu á 80 ára degnum mánadagin 29. januar og takka fyri vinskap og arbeiði fyri tí føroyska!

**Sverri Egholm**
**24.01.2001**



# Beatles um The Beatles

**Ongantíð fyrr er bók útgivin, har beatlarnir sjálvir siga gott fyri hvørjum orði. Men nú er bókin The Beatles Anthology komin út kring allan heim. Niclas Johannesen hevur pilkað nøkur sitat úr bókini**

*Niclas Johannesen*

*2. partur*



JOHN: Paul og eg funnu væl út av tí beinanvegin. Eg var helst eitt sindur ivasamur, tí mínir eldru vinmenn fóru, meðan yngri vinir, sum Paul og George komu, men vit vandu okkum skjótt við hvønn annan.

JOHN: Hon (mamman, Julia) bleiv yvirkoyrd av einum fullum løgreglumanni – Tað var tað ringasta, sum nakrantíð er hent mær.

PAUL: Pápi mín gjørdist púrasta fyri ongum, tá mamma doyði. Tað var tað ringasta fyri meg: At hoyra pápa mín gráta. Eg hevði aldrin hoyrt hann grátið áður. Tú gerst vaksin alt í einum, tí tú roknar ongantíð við at skula hoyra tíni foreldur gráta.

GEORGE: So Paul og eg plagdu at vera við sama bussi, í sama skúla og sama búna, tá vit koyrdu heim fra Liverpool Institute. Eg uppdagaði, at hann hevði eina trompet, og hann fann útav, at eg hevði ein guitar. Eg var umleið 13 ár.

GEORGE: John var longu kendur fyri at vera nakað serligt í skúlanum hann gekk. Hann hevði »an attitude«. Og hann visti tað.

RINGO: Eg fór at ganga saman við eini gentu. Men tað helt ikki serliga leingi, tí hon byrjaði at leggja trýst á meg. Tað var antin trummurnar ella hon. Eg fór frá henni eitt kvøldið og hugsaði: »Hvat hendir, um eg ikki komi aftur?« Og eg vendi aldrin aftur. Eg vildi bara spæla, tað hevði størri týdning fyri meg. Men vit vóru forlovað og eg elskaði hana.

PAUL: Vit høvdu spælt við tankanum um at broyta okkara nøvn til verulig showbiz nøvn, og nú, tá vit vóru veruligir yrkistónleikarar, skuldi tað vera. Eg bleiv til Paul Ramon, sum eg helt var rættiliga eksotiskt og hóskandi. George bleiv kallaður Carl Harrison eftir Carl Perksins (hann var okkara stóra idol). John var Long John. Fólk hava síðani sagt: Ah, John broytti ikki sítt navn. Lat meg siga tær: Hann var Long John. Vit broyttu allir navn.

JOHN: Í Hamburg vóru vit noyddir at spæla í tímavís uttan íhald. Hvør sangur vardi einar tjúgu minuttir og vit spældu tjúgu soloir. Vit spældu millum átta og tíggju tímar hvørt kvøld. Tað var hetta, sum bøtti um okkara spæl. Og týskarum dámar heavy rock, so vit máttu rokka alla tíðina.

JOHN: Mín rødd byrjaði at fara og eg píndist av at syngja. Men vit lærdu frá týskarunum, at tú kundi halda teg vaknan við at eta pillarar, so tað gjørdu vit. Eg plagdi at vera so í ørviti, at eg lá á gólvinum aftan fyri klaverið, fullur, meðan restin av orkestrinum spældi.

RINGO: Hetta var tann tíðin í okkara lívi, har vit funnu tablettir, »uppers«. Tað var tann einasti hátturin, tú kundi orka at spæla so leingi út í eitt. Teir kallaðust Preludin, og tú kundi keypa teir yviri við diskin.

PAUL: Tað kom eitt sindur ilt ímillum meg og Stuart (Sutcliffe). Eg vil vera við, at eg vildi tryggja, at vit vóru allatíðina so góðir sum gjørligt musikalskt, um tað skuldi bera so á, at onkur talentmaður hoyrdi okkum. Fólk vilja helst kalla hetta perfektionistin í mær. Hetta førdi til nakrar skrammur okkara millum, og eg kundi helst verið eitt sindur meira sensitivur á hesum økinum. Men hvør er tað í slíkum aldri? Ið hvussu er ikki eg.

GEORGE: Eg haldi tað gingu tveir mánaðir, áðrenn fimm oyrað fall og eg visti, hvat teir veruliga søgdu: »Øll undir átjan ár, farið út.« Eg var bert seytjan og eg sat har við bólkinum og bleiv ørkymlaður, og til endans fann onkur út av tí. Eg veit ikki hvussu. Vit høvdu ikki nøkur arbeiðsloyvi ella nakað visa, og eg sum var undir aldursmarkinum byrjaði at brenna undir okkum. Ein dagin kom so løgreglan og sendi meg heim.

PAUL: Hamburg fór serstakliga illa við okkum. Eg minnist, hvussu eg kom heim til Onglands og pápi mín helt eg var hálvdeyður. Eg sá út sum ein beinagrind. Sjálvur hevði eg ikki verið varugur við broytingina, tí eg hevði havt tað so frálíkt!

JOHN: Vit vóru altíð anti-jazz. Eg haldi tað er lorta tónleikur – upp aftur býttari enn rock’n’roll.

GEORGE: Hann (Stuart Sutcliffe) segði: »Eg fari úr orkestrinum, vinir. Eg fari at vera hjá Astrid.« Tá hetta hendi, segði eg: »Vit fara ikki at fáa ein fimta lim upp í at spæla bass. Ein av okkum trimum má gerast bassspælari og tað verður ikki eg.« Og John segði. »tað verður ikki eg« og Paul tóktist ikki at hava nakað ímóti at gera bassspælari.

PAUL: Ongin vildi veruliga spæla bass, tað var tí Stuart spældi hann. Í veruleikanum vildu vit allir vera guitarspælarar.

GEORGE: Brian (Epstein) kom at lurta eftir okkum. Eg minnist, hvussu plátuvendarin Bob Wooler kunngjørdi »Eigarin av plátuhandilinum NEMS, harra Epstein, er her og lurtar í kvøld.« Hann stóð afturi í gjøgnum og lurtaði og aftan á kom hann í umklæðingarrúmið. Eg helt, hann var ein ordans ríkmaður, tað er mítt fyrsta minni um hann. Eg haldi, hann kom fleiri ferðir, áðrenn hann gjørdi av, at hann vildi vera okkara managari.

JOHN: Eg minnist, hann sá ríkur út. Hann roymdi at managa okkum, men rakk okkum ikki ordiliga. Vit søgdu: »Vit vilja ikki hava teg.« Paul var ikki so við upp á tað, men hansara háttur at handfara ting er meira konservativur. Hann sigur tað enn tá sjálvur – og tað er fínasta slag. Kanska endar hann við at hava fleiri stuttleikabátar enn vit.

PAUL: Vit byrjaðu veruliga at halda, at vit høvdu brúk fyri tí besta trummuspælaranum í Liverpool, og í okkara eygum var tann besti ein fýrur, ið kallaðist Ring Starr. Hann hevði broytt sítt navn áðrenn nakar av okkum, og so hevði hann eisini skegg.

JOHN: Mytan vaks gjøgnum árini, at hann (Pete Best) var framúr og Paul var øvundsjúkur inn á hann, tí hann sá eisini gott út, umframt annað møsn og tvætl. Teir funnu ikki so øgiliga væl útav tí, men tað komst eisini av, at Pete var eitt sindur seinur í tí. Hann var ein vandaleysur fýrur, men hann var ikki kvikur. Vit høvdu allir eitt kvikt høvd, men hann fangaði tað aldrin.

RINGO: Eg var sera ólukkuligur, tá eg fann út av, at George Martin ivaðist í mínum dygdum. Eg kom til London, klárur at leggja í vaðið, men fekk at vita »vit hava fingið ein professionellan trummuspælara«. Hann var longu bílagdur, orsakað av trupulleikunum við framførsluni hjá Pete Best, og George vildi ikki taka fleiri kjansir. Gamli George hevur síðani fleiri ferðir givið sína treytaleysu umbering, men tað knústi meg – eg hataði hann fyri hetta í áravís.

So tað er Andy White, sum spælir á »Love Me Do« single-lagnum – men eg spæli seinni á LP-plátuni. Andy gjørdi ikki nakað, sum eg ikki kundi gera.

GEORGE: Vit góvu út »Love Me Do« og lagið kláraði seg væl. Tað rakk nummar seytjan á hit-listanum. At hoyra »Love Me Do« á fyrsta sinni í útvarpinum fekk meg at rista um allan kroppin. Tað var tann besta kenslan nakrantíð.

PAUL: At býta sangrættindini javnt millum Lennon og McCartney var ein avgerð, vit tóku rættiliga tíðliga, tí vit vildu vera líka sum Rodgers og Hammerstein. Tað einasta, vit vistu um sangskriving var, at teir og fólk sum Lerner og Loewe gjørdu tað. Vit høvdu hoyrt hesi nøvn og settu sangskriving í samband við teir, so samansetingin av tveimum nøvnum ljóðaði áhugaverd. Eg vildi, at tað skuldi vera McCartney/Lennon, men John hevði sterkari persónligheit og eg haldi, hann fekk tað í lag gjøgnum Brian. Hann var hálvtannað ár eldri enn eg, og í slíkum aldri ger tað stóran mun.

JOHN: Paul og eg sótu nógv eyga til eyga tónlistarliga í gomlum døgum. Og eg trúgvi, at vit arbeiddu væl saman, tí okkum eisini dámdi sama slag av tónleiki. Onkuntíð skrivaðu vit saman, aðrar tíðir hvør sær. At byrja við skrivaðu vit hvør sær, tí Paul var meira avanseraður enn eg. Hann dugdi altíð einar tvær akkordir, sum eg ikki dugdi, og hansara sangir høvdu vanliga fleiri akkordir enn mínir. Pápi hansara spældi klaver. Hann spældi altíð popp og jazz standardarsangir og Paul fangaði tað frá honum. Vit skrivaðu saman, tí okkum dámdi tað sera væl til tíðir.

PAUL: George plagdi at skriva sangir. Ella skrivaðu vit ein til hann. Síðani byrjaði George at koma seg: »Hví skulu tit skriva mínar sangir?« Og so byrjaði hann at skriva sínar egnu. At byrja við plagdi George at hava ein sang við á hvørji útgávu. Tað var einaferð upp á tal at fáa George upp í okkara sangskrivarateam. John og eg høvdu veruliga prátað um tað. Eg minnist, eg og John gingu framvið Woolton kirkjuni ein morgun, har vit reistu spurningin: »Uttan at vera ov harður við George, skuldu vit tríggir skriva ella er tað er betur at hava tað einfalt?« Vit gjørdu av, at vit skuldu halda okkum til okkum báðar.

GEORGE: Eg var í tí hepnu støðu at sita saman við hinum – t.d. í einum bili – meðan ein sangur varð skrivaður ella var við at fáa skap. Her lærdi eg eitt sindur um, hvussu tað var at skriva eitt lag. Eg minnist, hvussu eg einaferð sat við Paul í einum biografi. Tey vístu eina lýsing fyri Link Furneture, ið segði »Are you thinking of linking?« »Á, hatta riggar væl til ein sang, segði Paul, og hann skrivaði ein sang sum ljóðaði »Thinking of linking my life with you.«

John var altíð hjálpsamur. Hann segði við meg, »tá tú skrivar, royn at skriva allan sangin beinanvegin, tí um tú sleppur honum, verður tað verri at gera liðugt.« Og tað er satt – viðhvørt, ið hvussu er. Hann gav mær nøkur góð ráð og vit skrivaðu okkurt saman seinni í 60’unum. Eg vitjaði hann í hansara húsi ein dag, og hann stríddist við einum trimum sangum, sum ikki vóru lidnir, og eg kom við nøkrum uppskotum og hjálpti honum at stykkja hesi saman í ein lidnan sang »She Said, She Said«. Tann mittasti parturin av sanginum er frá einum øðrum lagi: »She said, I know what it’s like to be dead« og eg kom við partinum »Oh, no, no you’re wrong«

Onkuntíð plagdi eg at skriva honum sangir, sum eg ikki hevði fingið lidnar. Ein dagin spældi eg honum ein og hann segði: »Hatta er ikki so býtt«. Hann gjørdi onki víðari um hetta mundið, men eg legði til merkis, at á næsta lagnum, hann skrivaði, hoyrdi eg, at hann hevði stolið akkordskiftini frá mínum lagi!